## The Dreams fær føroyskan stuðul



Føroyingar sleppa at atkvøða, tá ið føroyski punkbólkurin The Dreams fer at taka lut í danska Melodi Grand Prixnum. The Dreams skal verða við í Grand Prixnum sjálvt valkvøldið til løgtingið, og tá skulu teir kappast um at sleppa í finaluna í kappigini. Føroya Tele hevur nú fingið boð frá donsku fyriskiparunum um, at eisini føroyingar sleppa at atkvøða í kappingini. Danska Melodi Grand Prix verður tó víst á DR1, og tað ber eisini til hjá føroyingum at atkvøða, hóast teir fylgja valinum í sjónvarpinum hjá Kringvarpinum.

## Sigrun Gunnarsdóttir í Snarskivuni

Hósdagin 10. januar klokkan 16.00 letur Sigrun Gunnarsdóttir Niclasen, listakvinna, upp framsýning í Snarskivuni í Havn. Framsýningin er opin hvønn dag í januar og februar í vanligari upplatingartíð hjá Snarskivuni. Á framsýningini verða málningar hjá Sigrun, eins og eisini verður møguligt at síggja bókina, sum norski listfrøðingurin Eva Furseth fyri jól gav út um Sigrun og list hennara. Sigrun Gunnarsdóttir Niclasen, er fødd og uppvaksin á Eiði, og er ein av mest lærdu listafólkunum í Føroyum.

# ylt lyfti



nann, Heðin Mortensen, Anfinn Brekkstein, Álvur Kirke, sum hevur orðið, Finnur Helmsdal og Ronald



*Nógvir pensjónistar vóru í Tilhaldinum í gjár og lurtaðu eftir politiskum vísdómsorðum og gyltum lyftum*



*Tað er hent at hava stokkarnar við at stytta sær stundir*



*Lurtað varð við stórum áhugað*

eldrarøktina í Suðurstreymoy út við eldraíbúðum, ellisheimum og røktarheimum.

Eisini Anfinn Brekkstein, valevni fyri Sambandsflokkin, nevndi týdningin av at byggja fleiri ellis- og røktarheim í Suðurstreymoy.

Men hann nevndi eisini, hvussu stóran týdning tað hevur at leggja eldraøkið undir kommunurnar at umsita fyri at fáa tað loyst sum skjótast.

Álvur Kirke, valevni fyri Miðflokkin, minti á, at pensjónin er ikki ein gáva frá samfelagnum, tí tað er ikki annað enn tað, sum hvør einstakur hevur goldið til samfelagið ígjøgnum lívið.

Annars segði hann, at Miðflokkurin heldur at tað er rætt at avtaka sjúkrakassan og leggja hann undir skattin og at einskilja Kringvarpið, so at tað hvílur í sær sjálvum og so at fólk ikki verða tvingað at betala kringvarpsgjald.

Finnur Helmsdal, valevni fyri Tjóðveldi vísti til viðmerkingina frá Simma og staðfesti, at hevur eitt húski fastar útreiðslur upp á 15.000 krónur um mánaðin, er tað eyðsæð, at tann tíðin er farin, har landskassin klárar at fíggja pensjónirnar.

- Tí er tað, at nógv hava sæð ljósið og eru farin at spara saman til sína egnu eftirløn og tað heldur hann vera avgerandi neyðugt.

- Tað er neyðugt, at øll spara saman til sína egnu pensjón, annars loysist tann trupulleikin ikki, legði hann dent á.

Hann vísti eisini á, at hóast fólk fara av arbeiðsmarknaðinum fyri aldur, skulu tey framvegis hava eitt mein ingsfult lív og tí er tað ein høvuðsuppgáva at tryggja, at tey framvegis hava ein hóskandi bústað, hóskandi inntøku og sosialt samband og nakað at fáast við.

Men allarstørsta dentin eiga vit at leggja á at bøta um umstøðurnar at venja eldri, sum fáa blóðtøpp og heilabløðing.

Ronald Poulsen, valevni fyri Sjálvstýrisflokkin leggur áherðslu á, at pensjónin skal vera á nøktandi støði og hann tað skuldi ikki vera so, at tey, sum sjálvbodna pensjón, missa næstan allar viðbøtur.

Honum dámdi heldur ikki, at Samhaldsfasti var skattskyldugur.